# Summarfuglar í túsundatali

Fyri tey, ið hava áhuga fyri summarfuglum, er Sommerfugleparken í Sandnes staðið. Hetta er einasta av slíkum slagi í Noregi, og er eitt sera væl dámt ferðamál hjá vaksnum og børnum. Her er møguleiki at uppliva ótrúligar summarfuglar flúgva millum tey vitjandi í øllum litum ælabogans. Umframt mongu summarfuglarnar er eisini ein vøkur framsýning av klukkum og summarfuglum úr Suðuramerika. Sommerfugleparken fekk í november í fjør heiðurin sum ársins produkt innan ferðavinnuna í Rogaland-fylki. Hjúnini og eigararnir Eldar og Anita Bore tóku ímóti hesum heiðurinum.






















